## Risin sigraður

Um middagsleitið leygardagin legði seglbáturin hjá Bjørn av Heygnum út av Eiði. Kósin varð sett móti Risanum. Umframt Bjørn sjálvan vóru umborð Absalon Eysturoy, Herman Eysturoy, Erling Eysturoy og Rasmus Eysturoy. Hesir høvdu í kvittan, at vinna á Risanum. Um 12:30 tíðina byrjaði ferðin upp á Risan vestanífrá, og 6 tímar seinri høvdu hesir fýra »Eysturoyarnir« framt roysnisverkið: At seta fótin á hægsta punkt á 71 metra høga Risanum. Ein lítil dreki varð settur á Risan. Drekin stavar frá Guttormi Eysturoy, sála, sum var langabbi Herman og Erling. Um kvøldið sendi borgarstjórin á Eiði, Tordur Niclasen teimum eitt sms, har ynskt varð teimum tillukku við bragdinum. Takkarsvar kom beinanvegin við hesum ískoyti: »..stóra tøkk til øll Eiðis fólk fyri eina RISA stóra uppliving!«. Sum skilst er hetta fyrstu ferð at slíkt roysnisverk er framt og Risin sigraður!



## Dýrt taka sigarettir til Føroya

1.140 krónur oman á tað, sum kartongið við sigarettum kostaði at keypa. Tað verður prísurin frá 1. oktober, um fólk hava gloymt tað, ella ikki vita av tí, at frá 1. oktober er einki, sum eitur tollfrítt tubakk í Føroyum. Sambært heimasíðuni hjá útvarpinum boðar Taks frá, at eitt kartong av sigarettum kostar 380 krónur í Føroyum. Hava ferðafólk sigarettir við sær og siga ikki tollarunum frá, fáa tey bót. Bótin er 760 krónur, og harafturat skulu tey gjalda 380 krónur í tolli av sigarettunum, altso 1.140 krónur fyri 200 sigarettir.



*Partabrævavirðini í norskum sjómati eru í fríum falli*

*Mynd: FiskeribladetFiskaren*

# 29 miljardir upp í »royk«

**Pappírsvirðini hjá norskum feløgum, sum virka vørur úr fiski og krabbadýrum, eru fallin við 29 miljardum norskum krónum á børsinum í Oslo eftir bert einum ári**

VIRÐISBRØV
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Virðini í norskum sjómati – fiska-og krabbamati – eru fallin við út við 50% seinastu 12 mánaðirnar. Íleggjarar á børsinum í Oslo hava vent hesi vinnu bakið.

IntraFish skrivar, at partabrævavirðir fyri heilar 29 miljardir norskar krónur soleiðis eru »forduftað« eftir bert einum ári.

10. september í 2007 søgdu íleggjarar, at sjómatur er ein vinna í vøkstri. Potentialið er stórt, og íleggjarar eru positivir.

10. september í 2008 siga íleggjarar, at vónirnar til somu vinnu eru munandi minni orsakað av sjúku í alivinnuni og øktum framleiðslukostnaði.

Pappírsvirðini renna út úr feløgunum, sum úr eini opnari nót!

Sambært IntraFish eru virðini av feløgunum, sum framleiða sjómat, soleiðis fallin við 29 miljardum norskum krónum – ella 46,5% - á børsinum í Oslo í eitt ár.

Til samanburðar kann nevnast, at virðini av partabrøvum á børsinum í Oslo annars eru fallin við tilsamans 27% í sama tíðarskeiði.

# Null fiskidagar

**- Eg havi tikið avgerð um, at eingir fiskidagar verða útlutaðir til fiskiskap eftir botnfiski á Føroyabanka, og mín avgerð er grundað á sera dapru metingarnar um toskastovnin á Bankanum, sigur Tórbjørn Jacobsen, landsstýrismaður**

FISKIDAGAR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum hevur tikið avgerð um, at einir fiskidagar verða eftir botnfiski á Føroyabanka í hesum fiskiárinum.

- Bæði Fiskirannsóknarstovan og Fiskidaganevndin mæltu fyrr í summar til, at Føroyabanki verður friðaður fyri øllum fiskiskapi eftir botnfiski.

Í sínum tilmæli til fiskidagarskjeyt landsstýrismaðurin tí upp fyri løgtinginum, at Føroyabanki verður friðaður fyri allari botnfiskaveiði – uttan mun til reiðskap.

Tórbjørn Jacobsen ásannar, at løgtingið tók ikki undir við uppskotinum hjá landsstýrismanninum.

- Undir orðaskiftinum á løgtingi um fiskidagar varð heitt á landsstýrismannin um sjálvur at seta ætlaðu friðingarnar í verk innan fyri heimildirnar í lógini um vinnuligan fiskiskap at gera reglur um, hvussu fiskiskapurin skal fara fram.

Landsstýrismaðurin sigur, at hann tí í samsvari við løgtingsviðgerðina og nevndu tilráðingar hevur tikið stig til at banna allari botnfiskaveiði á Føroyabanka, og uppskotið er sent Fiskivinnuráðnum til hoyringar.

- Føroyabanki er frammanundan friðaður fyri trolveiði, og kunngerðin hjá landsstýrismanninum merkir, at Bankin nú eisini verður friðaður fyri línu-og snelluveiði.

Landsstýrismaðurin hevur soleiðis tikið avgerðina við heimild í grein 29, stk. 2 í lógini um vinnuligan fiskiskap.

- Her er ásett, at landsstýrismaðurin hevur heimild at áseta fiskidagaskipan eftir somu skipan sum fyri landgrunnin, tó við atliti til, hvussu Føroyabanki til eina og hvørja tíð er friðaður fyri ymiskar veiðiháttir.

Tórbjørn Jacobsen ásannar, at avgerðin í fyrsta umfari kann tykjast at raka meint.



- Men sum toskastovnurin á Føroyabanka er fyri,

# Veksandi mótstøða ímóti leitiboring

**Alt fleiri fólk í Norðurnoregi venda sær nú ímóti, at oljufeløg fara at leita eftir olju útfyri Lofoten, Vesterålen og í Barentshavinum**

NORÐURNOREG
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tvær nýggjar meiningakanningar í Noregi vísa, at stóru oljufeløgini, sum ætla sær undir leitiboring í Norðurnoregi og Barentshavinum, rættiliga eru við at stoyta saman við fólk í Norðurnoregi, sum eru ímóti hesum virksemi.

Meiningakanningarnar, sum Respons Analyse hevur gjørt, vísa, at mótstøðan veksur – ikki bara ímóti boringum í Lofoten og Vesterålen, men eisini ímóti boringunum í Barentshavinum.

Seinasta árið er fólkahugsanin broytt, soleiðis at stóru feløgini, sum ætla sær inn í hesi sárbaru økir at bora, eru við at stoyta saman við streymin av alt fleiri veljarum, sum seta seg upp ímóti.

Í dag eru 52% av fólkinum í Norðurnoregi ímóti leitiboring útfyri Lofoten og Vesterålen, meðan bert 36% eru fyri.

Fyri einum ári síðan vóru 50% fyri, meðan bert 34% vóru ímóti.

Av teimum í Finnmørkini, sum hava tikið støðu um hesar leitiboringar, eru 49% ímóti og 41% fyri.

Eisini, tá ið ræður um nýggjar leiðir í Barentshavinum, økist mótstøðan, hóast meiriluti enn er fyri hesum boringum.

Talið av teimum, sum vilja lata feløgini fremja leitiboringar í Barentshavinum, er minkað seinasta árið úr 66% niður í 53%.

Hetta skrivar FiskeribladetFiskaren á síni heimasíðu.



*Ein vakur morgun í Lofoten, har mótstøðan móti oljuleiting veksur*